

# Íslendskur politikari talar um banka-kreppuna

**Mikudagin ber til at hoyra íslendska altingslimin, Siv Friðleifsdóttir, greiða frá, hvussu ein politikari upplivir bankaskrædlið inni í tinginum og uttanífrá**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Krónan er viknað, so nógv ferðafólk koma. Fiskurin kostar minni uttanlands, so meira verður útflutt. Fólk spara á skilagóðan hátt, binda troyggjur, heinta ber og ferðast í egnum landi í staðin fyri at fara av landinum.

Mikudagin 20.januar kl.19.00 fer Siv Friðleifsdóttir, altingslimur og fyrrverandi ráðharri í Íslandi, at halda fyrilesturin: »Hvussu upplivir ein politikari bankaskrædlið inni í tinginum og uttanífrá.«

Fyrilesturin, sum er almennur og á norskum, verður í Norðurlandahúsinum, og tað er Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri.

Siv er í Framsóknarflokkinum, sum stjórnaði Íslandi saman við Sjálvstæðisflokkinum, tá bankarnir fóru á heysin og tóku við sær íslendska samfelagið.

Í fyrilestrinum fer hon at greiða frá, hví tað endaði so galið í Íslandi. Hvussu stjórnin, altingið og ikki minst fólkið svaraðu aftur.

Altingið setti eina kanningarnevnd, sum er um at vera liðug. Harafturat er norski-franski løgfrøðingurin Eva Joly sett at vera kanningarleiðari.

Siv fer eisini at vísa myndir, sum hon tók innan úr altinginum, tá kassirollukollveltingin feldi stjórnina í januar-februar í fjør. Hon fer at greiða frá egnum royndum av, hvussu tað var, tá fólkið leyp á tjóðartingið.

Men bankaskrædlið var ikki bara ringt. Fólk brúka nú meira tíð saman við sínum næstu.

Siv Friðleifsdóttir fer eisini at tosa um fólkaatkvøðuna um Icesavelógina.

Fyrilesturin verður á norskum.

# Politikkur á høgum hælum

**Týsdagin svarar Siv Friðleifsdóttir, altingskvinna, at svara spurninginum, um politikkur letur seg gera á høgum hælum**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært Siv, er svarið ein uppskrift, har upp á, hvussu fólk sjálvi gerast politikarar, og hvussu til ber at hjálpa øðrum at gerast politikari. Hon hugsar serliga um kvinnurnar.

- Men, sigur hon, menn fáa meira enn so okkurt burturúr at koma og lurta og læra.

Siv (fødd í 1962) hevur verið ráðharri í sjey ár, kommunustýrislimur í átta ár og hon hevur verið í altinginum síðani 1995. Hon er eisini virkin í politiska norðurlendska samstarvinum.

Í Norðurlandahúsinum týskvøldið fer hon at greiða frá, hvussu hon fór upp í politikk. Hvussu hon valdi sær nøkur mál, sum hon brennir fyri, hvørjum áhugabólkum, hon var í, hvussu hon brúkti networking og heimasíðu sína, hvussu hon svaraði ágangi aftur og, hvussu hon koyrdi á seg sjálva í mótgangi.

Eisini fer Siv at tosa um, hvussu flokkarnir í Íslandi hava roynt at fingið fleiri kvinnur upp í politikk. Altingið samtykti eitt uppskot hjá Siv Friðleifsdóttur um at seta ein almenna nevnd at virka í fimm ár fyri at fáa kvinnur við í politikkin (samanber Demokratia hjá okkum). Sjálv var hon forkvinna í nevndini til hon gjørdist ráðharri.

Siv hevur myndir frá arbeiðinum hjá kvinnunum í hennara egna flokki, Framsóknarflokkinum, millum annað frá hørðum maktkampum. Myndir eru eisini frá kvinnudegnum í Íslandi, tá kvinnurnar fóru úr arbeiði sínum út á gøturnar at gera vart við javnstøðu.

Fyrilesturin týskvøldið 19. januar kl.19.00 í Norðurlandahúsinum er almennur, og hann verður á norskum. Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri.